

# Posta Stamps Føroyar

## Nr. 33

Oktober 2017

ISSN 1603-0036

- Teir sjey svanirnir
- Jól 2017
- Føroyskt smáark 2. pláss

Posta
FAROE ISLANDS








FO 865-866

Royndarprent




# Teir sjey svanirnir

Eina ferð var tað ein maður og ein kona, sum áttu átta børn: sjey dreingir og eina gentu. So doyði konan, og maðurin syrgdi hana; men sum flestir einkjumenn giftist hann aftur og fekk eina dóttur við teirri seinnu konuni.

Men tá ið børnini vuksu upp, var stjúkmamman so ill við tey fyrru átta, at pápin kvíðaði fyri teimum og tordi ikki at lata tey vera í húsinum. Hann gróv tí eina jarðarstovu í einum heyggi og læt tey har inni. Til lás hevði hann bert eitt gullepli: stiklaði hann tað niðaneftir, fór heyggurin upp, og stiklaði hann tað omaneftir, læstist heyggurin aftur. Hvørja nátt vitjaði hann tey og bar teimum mat; men eplið læsti hann niður í eina kistu og bar altíð kistulykilin um hálsin.

Konan fekk illgruna, av tí at maðurin var altíð burtur um næturnar og matur saknaðist úr kovanum. Hon forvitnast um hetta, men frætti einki.

So gandaði hon dóttur sína til eina fjøður - tí gandakelling var hon - og setti hana upp í hattin hjá manni sínum.

Um náttina fór hann, sum hann var vanur, til heyggin, og fjøðurin ansaði væl eftir øllum. Tá ið maðurin var afturkomin, skapaði kellingin fjøðrina um aftur til dóttur sína, spurdi hana gjølla eftir, hvar ið pápin hevði verið, og dóttirin segði frá øllum.

Tá ið maðurin var sovnaður, stjól kellingin kistulykilin av hálsi hansara, fór í kistuna og tók gulleplið uppúr. So fór hon til heyggin og hevði nógvan mat við sær til børnini.



Svanur við ungum
Mynd: Harald Bjørgvin

Heyggurin lat seg upp, tá ið hon stiklaði gull-eplið niðaneftir; hon fór inn, gjørdi seg blíða við børnini og gav teimum mat. Dreingirnir settust at eta alt fyri eitt; men gentan vildi einki nema. Hin gamla gav dreingjunum hvørjum sína skjúrtu, og við tað sama at teir vóru komnir í tær, stóðu teir umskapaðir til svanir og flugu burt.

Stjúkdóttrini vildi hon geva ein serk; men gentan segði nei: hon tók hvørki mat ella klæði frá henni og bað lata seg vera eins-amalla.

Ja, hon skuldi fáa lov til at vera einsamøll longur enn hon hevði sinni til, segði tá kel-lingin við hana, fór út, læsti heyggin aftur og stiklaði gulleplið á sjógvin.

Gentan var ring, ólukkudýrið, og settist at gráta; hon hugsaði um at sleppa út, men hirdi ikki stórt um at liva, nú ið tað var gingið brøðrunum so. Tá ið pápin skuldi fara aftur at vitja børnini í heygnum og sá, at eplið var burtur, var hann út av lagi harmur, tí nú mundu tey hungra inni, hugsaði hann: og ikki slapp hann til teirra; hann grunaði, sum var, at konan hevði tikið eplið og forkomið tí.

Gentan í heygnum át av matinum, ið pápin hevði borið, til hann var uppi, og tók so at grava seg út við einum knívi, sum hon hevði hjá sær. Spakuliga gekk; men endin var, at hon slapp út.

Hon tók at ganga, gekk langt og leingi og kom umsíðir til eitt hús, hvar ein maður og ein kona búðu, sum einki barn áttu. Tey fagnaðu henni væl, og hon kærdi seg fyri



Li Yunzhong, sum hevur teknað frímerkini
«Teir sjey svanirnir»

Eitt svartprent er eisini gjørt í avmarkaðari nøgd. Tað er við í árbókini 2017 uttan eyka kostnað. Møguligt er at bíleggja svartprentið fyri seg, og tá er prísurin 150 kr stykkið.




Svartprentið «Teir sjey svanirnir»

teimum um vanlukku sína, og hvussu syndarligt tað var, at brøður hennara vóru gandaðir um til svanir av stjúkmóðurini. Tey hildu, at hon skuldi vera vælkomin at vera hjá teimum, og varð hon verandi har; men eingin sá hana læa ella spæla.

Ein dagin, sum hon gekk úti og spákaði, møtti hon einum presti og tók at kæra sína neyð fyri honum. Hann visti eini ráð til at fáa brøður hennara aftur til menniskjur, segði hann: men kvíðaði fyri, at hon kundi fylgja ráðunum til enda. Hon bønaði hann at siga sær tey: tí hon vildi royna alt.

Tá segði presturin, at hon skuldi seyma sjey skjúrtur, eina til hvønn bróðurin, av so fínum tráð sum kongurvág (spinnilvevur), og ikki mátti hon tala eittans orð, fyrr enn allar skjúrturnar vóru lidnar - men tað kom at vera ein long tíð.

Hon settist at seyma, og eitt ár gekk til hvørja skjúrtu. Einsýna vøkur var gentan, og ikki trutu tí fríggjararnir; men eingin fekk nakað mál av henni, so teir vóru allir at fara krøktir heim aftur. Summi hildu hana vera dumba, av tí at hon talaði einki.

Tá ið seks ár vóru umliðin, kom prinsurin sjálvur at fríggja til hennara; honum mundi hon fara at svara, hildu tey, um hon kundi tala. Men ikki kundi hann fáa nakað mál av henni, hann heldur.

Tá hevði stjúkmamman frætt, hvar hon var, og hvat hon hevðist at; hon tók við tað sama at leggja ill ráð fyri henni og førdi út í orð, at hon var trylsk og full av gandi.

Kongasonurin tosaði um at taka hana við valdi; men stjúkmamman helt, at verri átti at vera gjørt við hana enn so: hon átti at vera brend, tí at hon vildi ikki svara honum - tað




Ein snøgg mappa við smáarkinum, frímerkjunum og einum fyrstadagsbjálva er gjørd.
Í mappuni er eisini ein samandráttur av ævintýrinum á enskum og á kinverskum.

var ovgóð æra fyri hana, at slíkur maður skuldi hirða at fríggja til hennara.

Prinsurin bar í bøtuflaka fyri gentuni í fyrstuni; men stjúkmamman var ágrýtin og beit hana í bak so leingi, at prinsurin til endan trúði, at gentan var trylsk, og beyð at kynda bál til at brenna hana á.

Menn vóru sendir til at taka hana og føra hana til bálið; men í tí at hon setti fótin á bálsteinin, komu sjey svanir flúgvandi; hon tók skjúrturnar fram úr kistlinum og kastaði til teirra; tá vóru allar lidnar uttan tann síðsta, sum onnur erman vantaði í.

Hvør svanur fór í sína skjúrtu, og allir vóru tá fólk aftur, uttan ein varð at hava vong fyri annan armin, av tí at onnur skjúrtuerma hansara var ikki liðug.

Nú lysti seg at tala, segði gentan og greiddi so frá øllum tí illa, sum stjúkmamman hevði lagt fyri hana og brøðurnar.

Tá beyð prinsurin, at kellingin og dóttir hennara skuldu báðar vera brendar á tí sama bálinum, og so varð. Men hin kom at vera prinsessa og síðan drotning.

*"Færøske Folkesagn og Eventyr"*
*Frásøgn: Jóhan Hendrik Matras, Kirkja*




Frá vinstru: Martin Mörck og Li Yunzhong

# Kinverskt listafólk teknar føroysk frímerki

Drúgva samstarvið millum frímerkjadeildina hjá Posta og listamannin Martin Mörck gjørdi at frímerkjadeildin kom í samband við viðurkenda kinverska listamannin, Li Yunzhong úr Huhot í Mongolia.

Martin Mörck mælti til at vit samstarvaðu við unga mannin, tí hann er ein av teim ungu evnaríku listafólkunum ið umboða siðbundu kinversku málningalistina. Li Yunzhong hevur teknað frímerki bæði fyri Kina og ST og nú eisini fyri Føroyar. Hann var sera spentur upp á uppgávuna.

Posta hevur seinastu seks árini tikið lut á fleiri framsýningum í Kina og við einari kinverskari webshop, hava vit lagt stóran dent á at røkka kinverskum frímerkjasavnarum. Tað týdningarmesta við hesi útgávuni var tó at evnið skuldi vera føroyskt.

Gamla føroyska ævintýrið “Teir sjey svanirnir” , sum varð valgt sum myndevnið, er við í bókini hjá Jakob Jakobsen “Sagnir og Ævintýr” frá 1901. Frímerkjaútgávan er eitt samstarv millum Martin Mörck, sum hevur graverað og Li Yunzhong, sum hevur teknað.

Li Yunzhong er føddur í Huhot í Mongolia. Hann hevur lisið list og siðbundnar bókmentir á Inner Mongolia Normal University og Central Academy of Fine Arts (CAFA)

*Frímerkjaútgávan «Teir sjey svanirnir» varð prentað av Royal Joh. Enschedé í Niðurlondum. Høgrumegin síggjast nakrar myndir av prentingini av frímerkjunum.*














9,50 KR
19 KR



# China International Collection Expo 2017

8. september 2017, sama dag sum frímerkini "Teir sjey svanirnir " komu út, lat upp stór frímerkjaframsýning í Nanjing í Kina.

Listamenninir báðir, Li Yunzhong og Martin Mörck, vóru á felags føroyska/álendska básinum og signeraðu útgávuna.



F.v.: Li Yunzhong, Martin Mörck, Svanbjørg Manai og Ingun N. Olsen









# Føroyar nr. 2.




# í kappingini "Vakrasta frímerki í Evropa 2015"

Tað gleðir okkum at kunna boða frá at Føroyar vunnu 2. pláss við smáarkinum "Full sólarmyrking" í kappingini "Vakrasta frímerki í Evropa 2015", sum týska blaðið "Deutsche Briefmarken Revue" skipaði fyri.

Smáarkið, sum vísir fullu sólarmyrkingina, sum var tann 20. mars 2015, er teknað av viðurkenda norska listamanninum Martin Mörck, sum hevur gjørt sniðgivið fleiri føroysk frímerki.

Til ber framvegis at ogna sær hesa áhugaverdu útgávu. Ein snøgg mappa er gjørd og kostar hon einans 113,00 kr. Í mappuni eru smáarkið, tey leysu merkini og ein bjálvi við serstemplinum 20.03.2015.




Sólarmyrkingarmappan



Frá vinstru: Helmut Dallei, Týskland, Jan Billion, Maud C. á Geilini, Føroyar og Stefan Erne, Liktenstein. Foto: Dirk A. Friedrich, Territory

## Jólamerkini




30 DKK

## Jólakort



25 DKK



**TILBOÐ!** Jólaundirløg

30 DKK

**TILBOÐ!** Jólakúlur



# Jólini 2017

**Jólamerkini 2017**

Listakvinnan Elin P. Andreasen hevur teknað jólamerkini 2017, sum mynda ymisk jólaprýði. Fimtan jólamerki eru í arkinum.

Avlopið av søluni fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

**Prísur: 30,00 kr.** arkið

**Jólakort**

Trý dupult jólakort við myndevnum úr jólamerkjaarkinum fáast eisini til keyps. Jólakortini verða seld sum sett við trimum kortum í hvørjum setti.

**Prísur: 25,00 kr. settið.**

**Jólakúlur - TILBOÐ!**

Vøkru tekningarnar hjá Edward Fuglø um jólaevangeliið prýða vøkru jólakúlurnar, sum kunnu heingjast á jólatræið.

**Jólakúlur, 6 stk.:**

**Fyrr: 149,00 kr. settið**

**Nú einans: 75,00 kr.**

**Jólaundirløg - TILBOÐ!**

Vøkru tekningarnar hjá Edward Fuglø av jólaevangeliinum, sum prýddu jólafrímerkini í nøkur ár, kunnu nú eisini prýða jólaborðið. Eitt sett við seks smáum glasundirløgum umframt seks stór undirløg eru framleidd og klár at senda tær.

**6 undirløg (10 x 10 cm):**

**Fyrr: 60,00 DKK.**

**Nú einans: 30,00 kr!**

## Ársmappa 2017







445 DKK

## Árbók 2017




475 DKK



75 DKK

**Ársmappa**

Kundi tú hugsað tær at keypt øll ársins frímerki skjótt og ómakaleyst? So er hetta loysnin. Í ársmappuni eru øll frímerki og smáørk, ið eru givin út í ár. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.

**Prísur: 445,00 kr.**

**Árbók**

Árbókin savnar allar ársins frímerkjaútgávur og saman við frímerkjunum fært tú áhugaverdu søguna aftanfyri hvørja útgávu lýsta við greinum og vøkrum myndum.

Tekstirnir í hesi snøggu bók eru á donskum, týskum og enskum og hóskar bókin seg tí sera væl sum gáva til vinir og kenningar uttanlands.

Frímerki og smáørk eru sett í lummar í árbókini.

**Prísur: 475,00 kr.**




**GG!**

**Eitt svartprent av smáarkinum "Teir sjey svanirnir" er við í árbókini 2017 - púra ókeypis!**

# Nýggjar útgávur - 8. september og 6. november 2017




FO 865-866

Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Teir sjey svanirnir** |
| Útgávudagur: | 08.09.2017 |
| Virði: | 9,50 og 19,00 kr. |
| Nummar: | FO 865-866 |
| Stødd, frímerki: | 37,7 x 45 mm |
| Stødd, smáark: | 90 x 63 mm |
| Listafólk: | Li Yunzhong |
| Gravør: | Martin Mörck |
| Prentingarháttur: | Offset / stálprent |
| Prentsmiðja: | Joh. Enschedé, Niðurlond |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv í Føroyum og til onnur lond, 0-50 gr. |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jólamerkini 2017** |
| Útgávudagur: | 06.11.2017 |
| Virði: | 30,00 kr. |
| Listafólk: | Elin P. Andreasen |
| Prentsmiðja: | Cartor Security, Frakland |




| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Árbók 2017** |
| Útgávudagur: | 06.11.2017 |
| Virði: | 475,00 kr. |
| Prentsmiðja: | TrykTeam, Danmark |




| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Ársmappa 2017** |
| Útgávudagur: | 06.11.2017 |
| Virði: | 445,00 kr. |
| Prentsmiðja: | TrykTeam, Danmark |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Svanir . Myndatøka: Jógvan Hansen . Prentsmiðja: Føroyaprent.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

/faroestamps